| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. januar 2018 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. januar 2018 **Kl**. 18:30
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 7/18-25/18

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Odd Færø
Djóni Nolsøe Joensen
Høgni Joensen
Jógvan Arge

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eydna Justinussen
Lars L. Black
Rúni A. Mortensen
Barbara Vang
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 3 |
| 8/18 | 16/04033-4 | Matr. nr. 255am, Kirkjubøur - Argir. Í útstykking Við Klingrutjørn.<br>Keypari hevur keypt sethús, og ynskir at lata grundstykkið innaftur. | 4 |
| 9/18 | 17/04187-2 | Søla matr. nr. 50v, Velbastaður. | 6 |
| 10/18 | 16/03784-17 | Keyp av óvbygdum grundøki matr. nr. 138bs, Hoyvík. | 8 |
| 11/18 | 18/00140-4 | Servituttur á matr. nr. 1381h, Tórshavn. | 10 |
| 12/18 | 17/01974-1 | Søla av ognini matr. nr. 853m, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn | 12 |
| 13/18 | 16/02207-1 | Møgulig søla av ognini matr. nr. 212, Argjavegur 7, Argir | 14 |
| 14/18 | 14/01117-42 | Matr. nr. 135 11, Hoyvík. Afturkeyp av óbygdum sethúsagrundstykki. | 17 |
| 15/18 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 19 |
| 16/18 | 16/03404-1 | Hitapottar o.a. til Svimjihøllina í Gundadali | 22 |
| 17/18 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 26 |
| 18/18 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 33 |
| 19/18 | 18/00160-1 | Niðurtøka av fjósið í Kollafirði | 37 |
| 20/18 | 15/03756-1 | Nýskapanarhúsið Hugskotið | 38 |
| 21/18 | 17/02470-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a, undir Gráasteini, Tórshavn | 42 |
| 22/18 | 18/00282-1 | Val av bygginevnd í sambandi við umbygging av Tjarnargarði | 45 |
| 23/18 | 18/00270-1 | Val av bygginevnd fyri Umlættingardepil | 46 |
| 24/18 | 17/03698-1 | Lýsing eftir fyrisitingarstjóra til Tórshavnar kommunu | 47 |
| 25/18 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 51 |

***7/18 Mál beind í nevndir 2018***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 8/18 Matr. nr. 255am, Kirkjubøur - Argir. Í útstykking Við Klingrutjørn. Keypari hevur keypt sethús, og ynskir at lata grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 6/18 | 16/04033-4 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 8/18 | 16/04033-4 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur :**

Keyparnir  skrivaðu undir fyribilsskeytið í 2016, og rindaði tá eisini ávegisgjald kr. 279.697,50

Í 2017 fingu keyparnir endaligu rokningina, sum íroknað tinglýsing er kr. 323.147,36 og hava tey samstundis fingið boð um at skriva undir endaligt skeytið.

Keypararnir boða frá, at tey hava keypt eini raðhús, og tískil ikki ynskja at keypa grundstykkið við Klingrutjørn. Keypararnir heita á kommununa um at taka grundstykkið innaftur og at afturrinda upphæddina sum tey hava goldið kr. 279.697,50

Vanliga mannagongdin hevur verið, at kommunan fastheldur keypara fyri skeytinum, higartil at kommunan hevur fingið annan keypara til grundstykkini.

Higartil hevur tað verið avgreitt á tann hátt, at kommunan bjóðar fremsta umsøkjara á bíðilistanum til grundstykkir grundstykkið til keyps, og hevur kommunan afturgoldið keypspeningin tá í nýggjur keypari hevur skrivað undir keypsskeytið.

Sum kunnugt hevur kommunan tikið bíðilistan av, og verða grundstykkini frameftir bjóðaði út í almennum lutakasti, tá ið grundstykki eru tøk.

Kommunan hevur bjóðað umsøkjara grundstykkið vegnað serligan tørv, men sýnist viðkomandi ikki at hava áhuga í at yvirtaka grundstykkið.

Tað kann viðmerkjast, at í hesum føri hava eigararnir av matr.nr. 255 am og 255 be, býtt um grundstykki sína millum. Í hesum føri verður stykkið matr.nr. 255am tøkt, at luta útaftur.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.
Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum. Ongir.**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | x | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at taka grundstykkið innaftur og at afturrinda keyparanum ávegisgjaldið kr. 279.697,50 og at luta grundstykkið út sambært Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

# 9/18 Søla matr. nr. 50v, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 2/18 | 17/04187-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 9/18 | 17/04187-2 |

**Upprunin til málið:** Kommunan keypti óbygda kommunala grundstykkið aftur í ár Afturkeypsprísur kr. 115.675,00.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Vísandi til at grundstykkið hevur ligið óbygt, kravdi Kommunan grundstykkið innaftur. Ognarmeklari varð biðin um at lýsa stykkið til sølu, og varð grundstykkið í samband við søluna tá virðismett til millum kr. 125.000 og kr. 150.000
Virðismetingin tykist rættuliga lág, men vísti ognarmeklarin til, at talan er um brattlendi, og at tað einans ber til at byggja eini serstøk – arkitekt teknaði hús á stykkinum.

Grundstykkið varð síðani lýst til sølu við prísuppskoti kr. 150.000 – tó við fyrivarni um, at kommunan tilskilar sær rætt til at havna øllum boðum.

Sambært ognarmeklara lá grundstykkið til sølu í góðar 3. vikur – og løgdu 3 ymiskir áhugaðir keyparar boð inn uppá stykkið. Seinasta boðið var kr. 200.000 og var galdandi til 13.12.2017. Meklarin boðaði øllum áhugaðum keyparum frá hesum, men kom onki mótboð innan freist. Tískil valdi meklarin í samráð við løgdeildina, at taka grundstykkið av sølulista – og verður málið lagt fyri fíggjarnevnd/býráð.

**Lógir, ásetingar o.a.** § 44 í Kommunustýrislógini.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongi.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongi.

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar | Fyri ávís økir í | Fyri ávísar samfelagsbólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | kommunu | kommununi | ella felagsskapir | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
**Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til, at selja grundstykkið fyri innkomið boð áljóðandi kr. 200.000,00**

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 10/18 Keyp av óvbygdum grundøki matr. nr. 138bs, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 8/18 | 16/03784-17 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 10/18 | 16/03784-17 |

**Upprunin til málið:** Talan er um eitt sethúsagrundstykki Við Myllutjørn í Hoyvík.

Eigarin keypti grundstykkið í november 2012, og liggur grundstykkið óbygt.

Kommunan hevur rykt uppá byggifreist, og er málið síðani handa Advokatfelagnum, at innheinta.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí omanfyri. Eigarar ynskja nú at lata grundstykkið innaftur, og hava undirskrivað skeytið, har kommunan yvirtekur grundstykkið aftur fyri kr. 451.681,00 sum er upprunaprísurin. Peningurin skal flytast á klientkonto hjá Advokatfelagnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum. Ongir.**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Skeyti. Rykkjarar.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 451.681,00

Tá ið skeytið er tinglýst til kommununa, verður grundstykkið selt í fríðari sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

# 11/18 Servituttur á matr. nr. 1381h, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 1/18 | 18/00140-4 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 11/18 | 18/00140-4 |

**Upprunin til málið: Tinglýstur servittuttur frá 1977, har kommunan hevur forkeypsrætt.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Viðv. matr.nr. 1381h, Tórshavn.
Talan er um grundstykki við ástandandi bygningi.
Tá ið kommunan í 1977, seldi matrikulin sum óbygt, grundstykki, varð millum annað soljóðandi servituttur tinglýstur á ognina.
*Tórshavnar kommuna hevur fyrsta keypsrætt, um eigarin seinni ynskir at avhenda sína ábygdu ogn.*
Á ognini er ábygdur vinnubygningur.
Tað kann viðmerkjast, at ognin hevur verið handlað fleiri ferðir, og hevur kommunan ikki gjørt sín forkeypsrætt galdandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum) ongir.**

**Skjøl.** Áheitan frá Advokatskrivstovuni um loyvi til víðarisølu. Víðarisøluskeyti.
Upprunaskeyti við tinglýstum servituttum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at frávíkja forkeypsrættin og at loyva víðarisølu, og at beina málið um at strika servituttin í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

# 12/18 Søla av ognini matr. nr. 853m, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 153/17 | 17/01974-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 165/17 | 17/01974-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 3/18 | 17/01974-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 12/18 | 17/01974-1 |

**Málslýsing:**

Ætlanin er at selja ognina Fr. Petersensgøtu 9, matr. nr. 853m.
Grundstykkið 272m2 til víddar.
Raðhús. 3 hæddir á uml. 148m2. Tó kjallarahæddin ikki full manshædd allastaðni.

Sambært notati frá leiðaranum í byggideildini framgongur, at bygningurin kann brúkast til skrivstovu ella líknandi. Bygningurin kann eisini gerast til sethús, við í mesta lagi 2 íbúðum. Skal bygningurin matrikulerast sundur í 2 ognir, so krevur tað eina viðgerð um frávik í mun til stødd á grundstykki og tal av parkeringsplássum. Hetta vil eisini krevja góðkenning frá Umhvørvisstovuni, sum er mynduleiki á økinum.

Ognin verður sum er leigað út til Fróðskaparsetrið. Leigumálið er galdandi til ultimo oktobur 2020, og kann ikki uppsigast av leigara ella útleigara fyrr enn nevnda dag. Leigarin hevur ætlanir um at flyta út um árskiftið. Kommunan liggur í løtuni í samráðingum við leigaran um at flyta út skjótast gjørligt, soleiðis at kommunan kann selja ognina.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla Býráðnum til at lýsa ognina til sølu til hægstbjóðandi, so skjótt sum leigarin flytir.

Víst verður til fíggjarnevndarsamtykt 14. juni 2017. Mál nr. 17/01875

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið við teirri viðmerking, at bygningurin skal seljast keypara, ið kann vísa á, at hann ætlar at nýta bygningin til bústaðir og ikki til skrivstovu ella líknandi.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt:
Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti.**
Ognin hevur verið til sølu hjá ognarmeklara. Innkomið boð 3,7 mill. kr. var galdandi til 22.12.2017 kl. 16:00 og kom onki mótboð innan freist og hevur ognarmeklarin tikið ognina av sølulista, og hevur sent kommununi endaliga søluváttan til undirskrivingar.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at selja ognina fyri innkomið boð áljóðandi 3,7 mill. kr.

Bústaðarskylda verður tinglýst sum servituttur á ognina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 13/18 Møgulig søla av ognini matr. nr. 212, Argjavegur 7, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 201/16 | 16/02207-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 186/17 | 16/02207-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 53/17 | 16/02207-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 265/17 | 16/02207-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2018 | 4/18 | 16/02207-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 224/17 | 16/02207-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 26/18 | 16/02207-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 13/18 | 16/02207-1 |

**Málslýsing:**

**Søla av ognini matr.nr. 212, Argir, Argjavegur 7**
Ognin varð keypt í 2006 við atliti til framtíðar breiðkan av vegnum og við atliti til gamlan kirkjugarð og minnisvarða í økinum.
Í 2011 varð gjørdur leigusáttmáli við Havnar Harmonikufelag. Sí hjálagt. Hesin gekk út í 2014, uttan at meira er hent síðani. Sum skilst, er talan um avmarkað virksemi, og er ikki annað virksemi á ognini.

Mett verður, at virksemið hjá Harmonikufelagnum mest sannlíkt kann vera aðrastaðni í kommunalum hølum.

Í sambandi við sølu kunnu 3 modell hugsast.

a). Kommunan tekur húsini niður, áðrenn ognin verður seld, og fíggjar niðurtøkuna við fæi frá søluni, umframt at tekniska fyrisiting ásetur, hvussu stórur partur av lendinum skal leggjast afturat vegnum.
b). Í sambandi við sølu verður sett sum krav, at nýggi keyparin tekur húsini heilt ella partvíst niður, soleiðis at húsini ikki koma longur út enn ásett av teknisku fyrisiting ásettu metrar frá vegnum, og at tann partur av lendinum verður lagdur afturat vegnum.
c). Kommunan tekur húsini niður, men bíðar við møguligari sølu.

**Tilmæli**:
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Fíggjarnevndin tekur ikki undir við at selja húsini.

**Ískoyti.**
Leiðarin í mentamáladeildini, hevur saman við umboðum fyri løgdeildina, havt fund við Havnar Harmonikufelag. Kommunan kann bjóða felagnum høli í skúlum, at brúka til teirra virksemi. Avtalað varð, at kanna møguleikarnir í samráð við Skúlaleiðslurnar. Havnar Harmonikufelag er sinnað at flyta, um felagið kann fáa onnur nøktandi høli.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og mentamálanevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við samtyktini í fíggjarnevndini 8. juni 2016 um ikki at selja húsini.
Eisini verður mælt til at ætlan verður gjørd til framtíðar vegalinju, áðrenn støða verður tikin til hvussu økið annars skal skipast.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at húsini verða tikin niður beinanvegin.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Ískoyti**
Fyri at økja um nyttuvirði av kommunalum ognum er best um felagsvirksemi av hesum slag so vítt tilber fer fram í hølum, ið eisini hava aðrar funktiónir. Mett verður sera sannlíkt, at verandi virksemi innan stutta tíð kann vera hýst á nøktandi hátt í øðrum kommunalum bygningi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við samtyktini hjá teknisku nevnd.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við samtyktini hjá teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Í sambandi við framtíðar skipan av økinum, breiðkan av vegnum, gamla kirkjugarðin, ið lá til Argja hospital, og minnisvarðan í økinum, verður mælt frá at selja ognina, matr. nr. 212 á Argjum. Ognin liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini og í sambandi við framtíðar býarskipanarlig viðurskifti er ognin væl egnað til fríøki umframt atkomu til lendið omanfyri.

Fornminnissavnið hevur gjørt fornfrøðiligar kanningar av gamla kirkjugarðinum, og staðfest hvar leivdir funnust. Tilmælið frá fornfrøðimyndugleikunum var tá at fríhalda eitt øki uttan um kirkjugarðin, journal nr. 2006-1723 *Varðveiting av gamla kirkjugarðinum á Argjum matr. 212 á Argjum.*

Húsini á ognini, ið liggja út til vegin, eru í sera ringum standi, tískil mælir umsitingin til, at kommunan tekur húsini niður beinanvegin. Metti kostnaðurin fyri niðurtøkuna er kr. 150.000.

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin og leiðarin á húsaumsitingini mæla frá at selja ognina, matr. 212 á Argjum, at kommunan tekur húsini á ognini niður, at játta kr. 150.000 av konto 6110 til niðurtøku, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 14/18 Matr. nr. 135 11, Hoyvík. Afturkeyp av óbygdum sethúsagrundstykki.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 25/18 | 14/01117-42 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 14/18 | 14/01117-42 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
**Talan er um eitt sethúsagrundstykki Karlotsgøta 2, Hoyvík.**
**Eigarin keypti grundstykkið í oktober 2005. Grundstykkið er óbygt.**
**Kommunan hevur rykt uppá byggifreist, og málið er síðani handað Advokatfelagnum, at innheinta.**
**Lýsing av málinum – samandráttur. Sí omanfyri. Eigarin letur grundstykkið innaftur, og hevur undirskrivað skeytið, har kommunan yvirtekur grundstykkið aftur.**
**Sambært skeytinum er keypspeningurin, kr. 274.176,-, sum er upprunaprísurin.**
**Peningurin skal flytast á klientkonto hjá Advokatskrivstovuni.**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 274.176,-
Tá ið skeytið er tinglýst til kommununa, verður grundstykkið selt í fríari sølu hjá ognarmeklara

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 15/18 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |
| 4 Eldranevndin | 15.01.2018 | 39/18 | 17/02942-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 11/18 | 17/02942-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 15/18 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

<u>Demensdepil</u>
Í løtuni eru 10 búpláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl lættari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

<u>Tilgongd víðari</u>
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 16/18 Hitapottar o.a. til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 236/16 | 16/03404-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 320/16 | 16/03404-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 267/16 | 16/03404-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 284/16 | 16/03404-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 302/16 | 16/03404-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.02.2017 | 13/17 | 16/03404-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 100/17 | 16/03404-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 120/17 | 16/03404-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 313/17 | 16/03404-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.12.2017 | 333/17 | 16/03404-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 20/18 | 16/03404-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 10/18 | 16/03404-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 16/18 | 16/03404-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til samtykt hjá mentamálanevndini 30. august 2016 í máli 16/01711 Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali har nevndin heitir á um umsitingina um at leggja mál um hitapottar sunnanfyri svimjihøllina og russjibana til smábørn fyri nevndina á næsta fundi.

Umsitingin hevur innleiðandi kannað málini.

Viðv. russjibana fyri smábørn
Sí í fylgiskjali 1 tvey uppskot til russjibana. Kostnaðurin fyri uppskot 1 er kr. 124.608 (SEK160.000) , hartil kemur kostnaður til uppseting og frakt, mett til 20.000. kr, umframt kommunalt MVG. Samanlagt kr. 154.896.

Svimjihøllin kann í rakstrinum fyri 2016 bera kr. 84.896 av kostnaðinum.

Viðv. hitapottum sunnanfyri høllina
Sí í fylgiskjali 2 mynd av staðsetingini. Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga meting viðv. kostnaði fyri teknisku loysnina fyri 2 heitar pottar og 1 kaldan pott, umframt meting viðv. gerð av tilbygningi til endamálið. Í høvuðsheitum ein loysn við glasi. Eisini hevur verið umhugsa ein loysn har talan er um okkurt slag av hegni ella lágari facadu, men ikki við taki heilt ella lutvíst ella eina loysn har dragihurðar eru og sum kunnu vera latnar upp við høvi. Mett verður at ávísar avbjóðingar vera við ikki at hava tak, herundir serliga viðv. reinføri og reingerð vm.

Við fyrivarni verður mett at ein góð loysn kann fáast fyri umleið kr. 3.500.000 íroknað projektering, ráðgeving, eftirlit, ókent og kommunalt MVG.

Fígging er í verandi støðu ikki sett av til endamálið.

**Tilmæli**
Viðv. russjibana til smábørn
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða ætlanina og avgera um arbeiðast skal víðari við verkætlanini og við atliti til restfígging á kr. 70.000.

Viðv. hitapottum
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða ætlanina og meta um grundarlag er fyri at menna verkætlanina víðari og við atliti til fígging á kr. 3.500.000.

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Samtykt at játta kr. 1,6 mió. til russjibana til smábørn og uttandura hitapottar av kontu 5775 Ítróttaranlegg, løgukarmi ætlað langhyli og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Hitapottar
Sum víðari fyrireiking og menning av verkætlanini við hitapottum, er næsta stig at fáa gjørt eitt skitsuprojekt og kravfesting til útbjóðingartilfar. Ætlanin er at fáa Aquaplan Aps at fyrireika útboðstilfarið saman við umsitingini og leiðsluni í Svimjihøllini. Seinni í tilgongdini verður tilknýttur ráðgevi Sp/f PBC Consult, ið vanliga virkar sum HVS-ráðgevi til Svimjihøllina saman við Húsaumsitingini/Teknisku fyrisiting, ið dagliga varðar av bygnings- og skipanarviðlíkahaldinum av høllini. Húsaumsitingin kemur at hava samskipandi leiklutin í hesi verkætlanini.

Ætlanin er at heinta inn undirhondboð frá nøkrum veitarum (føroyskum og útlendskum) innan økið og fáa boð uppá loysnir innanfyri karmarnar sum ásett av mentamálanevndini um eina í høvuðsheitum uttandura loysn. Talan verður helst um ein nakað størri heitan pott ella tveir nakað smærri, umframt ein minni kaldan pott. Rundan um økið verður umhugsað ein loysn har talan er um okkurt slag av hegni ella lágari facadu.

Vatnrussjibani til smábørn
Tekstur kemur til fundin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara undir fyrireikingar av útbjóðingartilfari og koma aftur til nevndina á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeitt verður við at fáa ráðgevar til verkætlanina. Tilmæli um tað verður ætlandi tøkt til fundin.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Í verkætlanini viðvíkjandi vatnrussjibana hevur kommunan samstarva við Aquaplan Aps., ið er serkøn ráðgevingarfyritøka innan svimjihallarviðurskifti, baðiland v.m. og sum hevur verið virkin í Føroyum í mong ár.

Felagið vil fegin veita ráðgeving og gera eitt skitsuprojekt í plan og snit fyri uml 40 tkr. íroknað ferðing til Føroya o.a. Knýttur at felagnum er royndur arkitektur innan økið nevndur Peter Vegge. Teirra skitsuprojekt skal síðani gerast til eitt detailprojekt og mælir umsitingin til at tað verður gjørt av ráðgevarafeløgum innan HVS, el, konstruktión og jørð og kann so bjóðast út í vár og tá staðfesta endaliga kostnaðin. Av tí at talan er um lutfalsliga avmarkaða uppgávu verður ráðgevingin gjørd uppá tímabasis.

Játtaðar eru 1.600 tkr. á projektkonto L57027 til verkætlanina, helst er upphæddin nakað tepur, men vil tilgongdin í vár geva eitt greiðari grundarlag.

Málið kemur ætlandi aftur í nevnd í apríl. Síðani kann støða takast til møguligt útboð av arbeiðinum. Talan kann antin vera um eina høvuðsarbeiðstøku ella fakarbeiðstøkur. Nærri tilmæli kemur um tað tá detailprojektið fyriliggur.

Talan um gerð av potti/pottum, umframt arbeiðið við lendinum, girðing, íbindingum, hurð/slúsu inn í høllina o.s.fr.

Um útboð uppá arbeiðstøkurnar er í mai er hugsandi at verkætlanin kann vera framd í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at gera avtalur um ráðgeving.

**Mentamálanevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur og tekningar koma mánadagin

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Ískoyti**
Kommunan hevur fingið fyrsta skitsuuppskot frá ráðgeva (sí hjálagt). Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotinum og fyribils kostnaðarmeting. Ætlanin er síðani, at uppskotið verður lagað endaliga til og gjørt klárt til endaliga støðutakan í mai/juni, umframt støðutakan til útboð.

**Tilmæli**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017: Umrøtt.**

**Ískoyti:**
Mett verður at ætlanin, ið hevur verið í umbúna kostar umleið 2.500 tkr. – 3.000 tkr. Í verandi støðu eru 921 tkr. eftir á projektkonto L57027 til at fremja verkætlanina og er ikki sett av til endamálið í løguætlanini fyri 2018.

Innan grein 5 eru ymisk viðurskifti, ið umsitingin metir hevur størri tørv á møguligari fígging enn henda verkætlanin, ið ikki kann fremjast í verandi støðu. Tí verður mælt til at loka verkætlanina og flyta peningin aftur á løgukarmin 5775.

**Tilmæli:**

Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at loka verkætlanina og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. desember 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játtanin verður flutt aftur á løgukarmin 5775, Ítróttaranlegg.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Minnilutin mælir til at hitapottar verða settir upp við svimjihøllina í Gundadali og at játtaðar verða 1,5 mió kr aftrat av konto 6175

Atkvøtt varð um uppskotið frá minnilutanum, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Djóni Nolsøe Joensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Høgni Joensen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Gunvør Balle

Atkvøddi blankt:

# 17/18 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:

- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:

- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**
Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um "Category 4" leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein "Category 3" leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa byggingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-byggingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.
**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið

tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |

| | | |
| --- | --- | --- |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður byggingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
| --- | --- | --- |
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 18/18 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum
fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

<u>Realskúlin</u>
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum ein varandi miðbýarstovn, har hugsanin er, at hesin flytur og verður skipaður í skúlanum í Kongagøtu, tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**

Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

# 19/18 Niðurtøka av fjósið í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 15/18 | 18/00160-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 19/18 | 18/00160-1 |

**Upprunin til málið:**
Fjósið varð keypt í samband við útstykkingina í Kollafirði. Fjósið liggur á ognini matr. nr. 91l, í Homrum 33 í Kollafirði. Fjósið er ein betongbygningur í fleiri hæddum.

Fjósið ið liggur út móti Landsvegnum og er í sera ringum standi. Vandi er fyri at fjósið kann fara í luftina um ein stormur kemur, og kann hetta verða sera vandamikið.

Í storminum undan jólini vóru nøkur vindeygu og úthurðar blást úr fjósinum. Tískil mælir umsitingin til, at kommunan tekur fjósið niður beinanvegin. Metti kostnaðurin fyri niðurtøkuna er kr. 350.000.

Sløkkiliðsstøðin hevur fyribils tryggjað bygningin í tann mun hetta kann lata seg gera, um ein stormur skuldi komi.

Viðmerkjast skal at býarskipanardeildin í løtuni arbeiðir við at kanna møguleikarnar fyri at matrikulerað eitt grundstykkið á uml. 600 m2, á økinum har fjósið liggur.

Her eru ymisk viðurskifti sum greiða skal fáast á áðrenn ætlanin kann fremjast í verki. Talan er um staðseting, atkomu og teknisk viðurskifti. Tá ið alt er greitt, er ætlanin at lýsa hetta grundstykkið til sølu í fríðari sølu.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at kommunan tekur fjósið á ognini, matr. nr. 91l í Kollafirði niður beinanvegin, og at játta kr. 350.000 av keyp/sølu konto, konto nr. 6175 til niðurtøkuna.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

## 20/18 Nýskapanarhúsið Hugskotið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 32/15 | 15/03756-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 243/15 | 15/03756-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 182/15 | 15/03756-1 |
| 4 Vinnunevndin | 08.01.2018 | 3/18 | 15/03756-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 13/18 | 15/03756-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 20/18 | 15/03756-1 |

**Málslýsing:**

Í visjónini fyri Tórshavnar kommunu, okkara høvuðsstaður - virkin og vakin er m.a. ásett at kommunan ynskir at geva nýggjum vinnum góð vakstrarlíkindi.
Í samsvari við hesa visjón hevur kommunan arbeitt við at seta á stovn eitt íverksetarahús. Í fyrstani varð arbeitt við ætlanini at stovna eitt HIT hús í hølunum í Kongagøtu 7. Hendan ætlanin var seinni slept og hølini í Kongagøtu 7 vóru seld.

Ásannandi at tað er alneyðugt at fleiri vinnuvirkir verða sett á stovn í kommununi og fyri at betra um vakstrarmøguleikarnar hjá íverksetarum, varð mett, at tað er neyðugt at gera eitt íverksetaraumhvørvi, har íverksetarar kunnu savna vitan og verða stuðlaðir innan fígging, vørumenning, útflutning v.m. Og arbeitt varð tí framhaldandi við ætlanini um at seta eitt íverksetarahús á stovn í Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at kommunan eigur at viðvirka til, at dynamikkurin og skapanarhugurin, ið er í einum býi, sum hevur rætta lutfallið millum privatu vinnuna og almenn starvspláss, hevur betri sømdir. Kommunan má tí viðvirka til at gera karmarnar um vinnulívið meira fjøltáttaðar, og hava eitt breiðari fokus á vinnupolitiska økinum. Kommunan má skapa betri vakstrarrmøguleikar hjá teimum, ið hava góð hugskot og her er eitt íverksetararhús eitt sterkt signal at senda um, at kommunan vil vera viðspælari á vinnuøkinum.

Við hesum endamálið, varð Nýskapanarhúsið Hugskotið sett á stovn. Vinnunevndin samtykti málið 2. august 2013 og fíggjarnevndin samtykti málið 13. september 2013. Málið fekk síðani tvær viðgerðir í býráðnum og var einmælt samtykt tann 31. oktober 2013.

Síðani varð lýst eftir umsitara til Hugskotið og hesin varð settur í starv 1.apríl 2014.

Í apríl 2014 byrjaði ráðgevingin av íverksetaranum og í august 2014 fingu teir fyrstu íverksetararnir innvist í Hugskotinum. Hugskotið hevur sostatt virkað í eitt gott ár og hetta tíðarskeiðið hevur víst, at húsið nøktar ein tørv, sum var á økinum, bæði tá tað snýr seg um íverksetar, men eisini við ráðgeving til verandi vinnulív.

Hugskotið er sera væl móttikið. Síðani húsið lat upp, hava uml.110 íverksetar og fyritøkur (verkætlanir) verið í Hugskotinum og fingið ráðgeving. Tey flestu eru knýtt at húsinum í eitt longri tíðarskeið. 22 verkætlanir eru d.d. realiseraðar og 33 verkætlanir eru enn í gongd.

Tað eru ikki bert nýggjar fyritøkur/íverksetar, sum leita sær til Hugskotið eftir ráðgeving. Av teimum, sum hava verið/eru í Hugskotinum, eru 14 verandi fyritøkur í Tórshavnar kommunu, sum hava ynskt ráðgeving til ymiskar avbjóðar. Tað vísir seg at áhugin frá verandi vinnulívi gerst størri og størri.

8 íverksetar hava innivist í Hugskotinum í løtuni.

Eitt av endamálunum er eisini at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu kveikja áhugan fyri íverksetan og at stovna egna fyritøku. Av teimum tiltøkum, sum hava verið síðani í vár eru:

-Skapandi Vinna, í samstarv við Østrøm (juni)
-Íverksetaradagur, í samstarv við Nebula (aug)
-Creative Business Cup, í samstarv við Vinnuframa og Íverksetarahúsið (sept)
-Innovatión og hugskotskapping fyri børn og ung, í samstarv við Eysturskúlan (sept til apríl)
-Íversetaraskeið, í samstarv við Kvøldskúlan (10 vikur frá sept til des)
-Hugskotskapping fyri børn og ung, í samstarv við Young Enterprise/Føroya Handilsskúla (okt/nov)
-Cafékvøld/Netverkan fyri íverksetarar (frá okt og leypandi)
-Jobmatch (des)

Framløga verður á fundinum.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at kommuna heldur fram við virkseminum í Nýskapanarhúsinum Hugskotinum, og at støða verður tikin til um virksemið skal halda fram í verandi hølum ella í nýggja Sjóvinnuhúsinum.
Eisini verður mælt til at taka støðu til, hvørt nýskapanarhúsið skal skipast sum fast rakstrarstað ella verkætlanin skal leingjast í eitt áramál afturat.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Nevndin samtyktini at leingja verkætlanina Nýskapanarhúsið Hugskotið til 1. apríl 2018 og at staðseta Hugskotið í Sjóvinnuhúsinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Í sambandi við at royndartíðin við Hugskotinum gongur út 1. apríl 2018, má støða takast til framtíðina hjá Hugskotinum.**

**Hví íverksetan?**
Í visjónini fyri Tórshavnar kommunu, okkara høvuðsstaður - virkin og vakin er m.a. ásett at kommunan ynskir at geva nýggjum vinnum góð vakstrarlíkindi.

Í samsvari við hesa visjón hevur kommunan sett á stovn Nýskapanarhúsið Hugskotið, sum 1.apríl 2018 hevur virkað í 4 ár. Síðani Hugskotið bleiv sett á stovn, hevur Hugskotið víst í verki at tørvur er á einum Íverksetarahúsið í Tórshavnar kommunu og hava íverksetarar, vinnan og borgarar tikið væl ímóti Hugskotinum frá fyrsta degi.

**Hugskotið status**
Síðani Hugskotið lat dyrnar upp, 1.apríl 2014 hava uml. 350 verkætlanir (íverksetarar og fyritøkur) verið í Hugskotinum og fingið ráðgeving. Tey flestu eru knýtt at húsinum í eitt longri tíðarskeið.
Verkætlanir sum arbeitt verður við eru innanfyri KT, tøkni, kompleksar loysnir, patent, sniðgeving, matvinnu, tænastuvinnu, byggivinnu, búnýti v.m.

Ein kanning bleiv gjørt av einum starvslesandi í Hugskotinum í des 16, sum bleiv send til 85 tilvildarligar íverksetarar. Ein spurningur í kanningini er, um hugskotið var blivið til veruleika, har 18% søgdu at ja, havi mítt egna virki og fólk í starvið. 29% søgdu ja, havi mítt egna virki. 6% søgdu ja, havi eitt virki saman við øðrum. 42% søgdu, at tey enn arbeiddu við sínum Hugskotið og 4% søgdu at tey høvdu valt ikki at arbeiða víðari við sínum Hugskoti.

Eisini bleiv spurt um íverksetararnir fingu eina góða og viðkomandi ráðgeving í Hugskotinum, har 100% svaraðu ja. Eisini bleiv spurt um tey vildu viðmæla øðrum íverksetarum at fara í Hugskotið og fáa sær ráðgeving, har 100% eisini svaraðu ja.

Tað eru ikki bert nýggjar fyritøkur, sum leita sær til Hugskotið eftir hjálp. Av teimum, sum hava verið í Hugskotinum, eru 19 verandi fyritøkur í Tórshavnar kommunu, sum hava ynskt ráðgeving til ymiskar avbjóðingar.

At Hugskotið er flutt út í Sjóvinnuhúsið hevur ført við sær at fleiri íverksetarar í dag hava møguleika fyri at fáa innivist í Hugskotinum. Í Niels Wintersgøtu vóru tað 12 íverksetarar sum høvdu innivist og í Sjóvinnuhúsinum eru tað í dag 27 íverksetarar sum hava innivist.

*Tiltøk sum stuðla undir íverksetan*
At skipa fyri tiltøkum er eisini eitt av endamálunum hjá Hugskotinum, fyri at kveikja áhugan fyri íverksetan og at stovna egna fyritøku. Av tiltøkum sum Hugskotið skipar fyri eru:

- Íverksetarakafé (2. hvønn mðr)
- Íversetaraskeið, í samstarv við Kvøldskúlan (10 vikurs skeið)
- Creative Business Cup (í samstarv við Vinnuframa og Íverksetarahúsið í Klaksvík)
- Stylejam (kapping fyri skapandi vinnuna)
- Mítt Hugskot (tiltak har íverksetarar kunnu fáa íleggjarar. Tiltakið bleiv fyrstu ferð hildið í nov.17, har ein íverkseti fekk 300 tkr. frá einum íleggjara)
- Íverksetaraskeið fyri næmingum í Eysturskúlanum (4. Til 9.flokk)
- Jobmatch

Hvørja ferð skipað verður fyri einum tiltaki, fær Hugskotið eftirfylgjandi fyrispurningar um ráðgeving.

**Tilmæli:**
Royndartíðin í Hugskotinum gongur út 1. apríl 2018. Í sambandi við tann stóra eftirspurningin, sum framhaldandi er eftir bæði ráðgeving og innivist í Hugskotinum, mælir kommunustjórin til, at Hugskotið verður ein varandi loysn í Tórshavnar kommunu.

**Vinnunevndin 08. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

# 21/18 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a, undir Gráasteini, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 207/17 | 17/02470-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2018 | 2/18 | 17/02470-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 21/18 | 17/02470-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2011 fekk Tórshavnar kommuna eina umsókn frá eigarunum av matr. nr. 1118a og matr. nr. 1116a, um eina útstykkingarætlan úti undir Gráasteini, sum ongantíð varð til veruleika.
Av tí at kommunan fekk fleiri umsóknir inn frá eigarum av øðrum matriklum undir Gráasteini, varð ein felags serstøk byggisamtykt gjørd fyri fleiri matriklar undir Graásteini. Vegna ósemju frá ymsum eigarum verður tó henda serstaka byggisamtyktin avtikin.

Síðani hevur umsitingin móttikið umsókn frá eigaranum av matr. nr. 1118a um eina útstykkingarætlanin, ið fevnir um 12 grundstykki til stakhús á økinum, veg/vendipláss, 8 parkeringspláss, gøtur og fríøki, sí kortskjal "Skipan av økinum" 17/02470-4. Grundstykkini eru millum 405 $m^2$ og 490 $m^2$. Av tí at stykkini eru minni enn 500 $m^2$, sum ásetingarnar í A1 (sethús) áseta grundstykkini í minsta lagi at vera, krevst ein nýggj serstøk byggisamtykt at verða gjørd.

Gøtur eru millum stykkini mitt í økinum og eru tær ætlaðar at samanbinda grundstykkini. Hesar skulu verða í minsta lagi 2 m breiðar, vísandi til almennu byggisamtyktina, Kap. V. §2. stk. 1 d. Tekniskar leiðingar skulu liggja har gøturnar eru.
Vegaatkoman til grundstykkini er frá trimum ymiskum vegum, sum kortskjølini sýna. Harumframt er eitt fríøki á syðsta horninum, sum er 811 $m^2$ til víddar.

Ognirnar liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:
*§5*
*Stk. 1 Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

*Stk. 2 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.*

*Stk. 3 Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.*

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**
Serstøk byggisamtykt skal gerast, tí grundstykkini eru minni enn 500 m$^2$.

Umsitingin metir ikki, sambært ásetingunum í A1 í almennu byggisamtyktini (sí stk. 3 omanfyri), at útstykkingarætlanin er nøktandi í mun til eina heildarætlan fyri eitt størri øki, her verður hugsað um, hvussu økið er skipað í mun til staðsetingina av sethúsum, fríøki, innkoyringum, leiðingum og reinsiverki.

**Skjøl**
Yvirlitskort, journal nr. 17/02470-4
Skipan av økinum, journal nr. 17/02470-4
Loftmynd, journal nr. 17/02470-4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti um gerð av nýggjari serstakari byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a, fyrr enn ein nøktandi útstykkingarætlan fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Omanfyri var mælt var frá at ganga umsóknini á møti um gerð av nýggjari serstakari byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a, fyrr enn ein nøktandi útstykkingarætlan fyriliggur. Men útstykkingarætlanin fyri 1118a er áður viðgjørd av umsitingini og byggi- og býarskipanarnevndini, dagfest 28. oktober 2016. Góðkenda ætlanin sæst á kortskjali *Góðkend útstykkingarætlan.*

Umsitingin hevur ikki verið varug við, at málið fyrr er viðgjørt, tískil verður málið at leggja fyri nevnd aftur, har hildið verður fast í samtyktini frá 28. oktober 2016, máls. nr. 16/02145-56. Tilmælið ljóðar soleiðis:
*"Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at góðkenna skipanaruppskotið, og at umsitingin ger eina serstaka byggisamtykt fyri ognirnar at leggja fyri komandi fund."*

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
16/02145 - Finnur Jógvan Rubeksen: Umsókn um sundurbýti matr. nr. 1118b, 1118a) Tórshavn (2001-0759)

**Skjøl:**
Góðkend útstykkingarætlan, journal nr. 17/02470-4
Yvirlitskort, journal nr. 17/02470-4
Skipan av økinum, journal nr. 17/02470-4
Loftmynd, journal nr. 17/02470-4

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at halda fast í samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini 28. oktober 2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

# 22/18 Val av bygginevnd í sambandi við umbygging av Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 22/18 | 18/00282-1 |

**Málslýsing:**
Val av 2 býráðslimum í bygginevndina í sambandi við umbygging av Tjarnargarði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus eru valdar í bygginevndina.

# 23/18 Val av bygginevnd fyri Umlættingardepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 23/18 | 18/00270-1 |

**Málslýsing:**
Val av 2 býráðslimum í bygginevndina fyri Umlættingardepil.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Bergun Kass og Halla Samuelsen eru valdar í bygginevndina.

# 24/18 Lýsing eftir fyrisitingarstjóra til Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 281/17 | 17/03698-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 319/17 | 17/03698-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 313/17 | 17/03698-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 19/18 | 17/03698-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 24/18 | 17/03698-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Miðfyrisitingarstjóri til Tórshavnar kommunu**

Í starvsfólkareglugerðini hjá Tórshavnar kommunu, sambært § 5, stk. 4 er heimildin til at seta stjóra ásett soleiðis:
*"1.1 Stjórar og deildarleiðarar*
*Lýsingin skal leggjast fyri fíggjarnevndina til góðkenningar. Lýsingin eftir stjórum skal eisini góðkennast av býráðnum"*
*"2.1 Stjóri ella býráðsskrivari setast í starv*
*Býráðið setur stjóra og býráðsskrivarin aftaná innstilling frá býráðskrivaranum og setunarbólki við tilmæli frá fíggjarnevndini."*

**Kommunustjórin mælir til at fíggjarnevndin tekur undir við hesi lýsing.**

**FYRISITINGARSTJÓRI TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU**
Fyrisitingarstjórin mannar stjórnarbólkin saman við borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðarstjóranum. Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av fíggjarøkinum, kt-økinum, starvsfólkaøkinum og borgaratænastuøkinum (Snarskivuni).

HØVUÐSUPPGÁVUR
- Tryggja, at miðfyrisitingin er før fyri at veita borgarum og vinnulívi í kommununi eina dygdargóða tænastu
- Tryggja, at miðfyrisitingin veitir politisku skipanini holla ráðgeving
- Saman við hinum stjórnarlimunum tryggja, at kommunan hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- Tryggja, at leiðslubólkurin á miðfyrisitingarøkinum virkar sum ein savnað, samskipandi og strategiskt hugsandi eind
- Menna miðfyrisitingina sum eitt gott og virkið arbeiðspláss við týðiligum virðum og greiðum málum
- Saman við hinum stjórnarlimunum fyrireika og menna kommununa fakliga og fíggjarliga, soleiðis at hon kann taka við teimum avbjóðingum og uppgávum, sum eru lagdar kommununum at umsita, herundir eisini at kommunan er klár til at at taka við teimum møguleikum og fyrimunum talgilding hevur við sær.

FØRLEIKAKRØV
Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum. Umráðandi er, at tú:
- hevur kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, ella tilsamans hevur sambærligt útbúgvingarstøði og royndir
- hevur kunnleika til og royndir frá leiðslu, fíggjarstýring og fyrisiting
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- hevur gott strategiskt skil
- dugir at seta greið mál og skapa úrslit
- dugir væl at raðfesta, samskipa og útdelegera
- hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnliga og skrivliga
- dugir væl føroyska málið í skrivt og talu
- megnar til tíðir at arbeiða undir stórum trýsti

Tann, ið sett/-ur verður skal hava kunnleika og innlit í samfelagsviðurskiftini í Føroyum í breiðum høpi. Politiskt tev er eitt krav, og royndir frá einum politiskum umhvørvi eru ein fyrimunur.

LØN OG SETANARTREYTIR
Starvið sum Fyrisitingarstjóri er flokkað sambært tænastumannasáttmálanum í 38. flokki, uttan at vera tænastumannasterv. Stjórasáttmáli verður gjørdur. Møguleiki er fyri áramálssetan.

MEIRA AT VITA
Ynskir tú fleiri upplýsingar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra, á tel 280909 ella við t-posti á bjorgfrid@torshavn.fo.

UMSÓKN
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møguligar tilvísingar skulu sendast til: torshavn@torshavn.fo. Viðmerk á umsóknina: „Miðfyrisitingarstjóri".

Umsóknir til starvið skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi

Mælt verður til at setanarbólkurin er mannaður av:
2 umboð fyri fíggjarnevndina
Bjørgfríð Ludvig, Kommunustjóra
Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra
Magnus Dam, løgfrøðingi

**Fíggjarnevndin 15. november 2017: Útsett.**

**Ískoytið:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017: Útsett.**

**Býráðsfundur 14. desember 2017: Tikið av skrá.**

**Ískoyti:**
Kommunustjórin mælir til, at fyrisitingarstjórin eisini fær til høvðusuppgávu, at talgilda kommununa.

Mælt verður til at setanarbólkurin er mannaður av:
- 2 umboðum fyri fíggjarnevndina
- Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra
- Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra
- 1 starvsfólki við royndum innan setanarviðurskiftir

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Eini meiriluti Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við uppskotinum til lýsing eftir fyrisitingarstjóra, at fyrisitingarstjórin eisini fær til høvuðsuppgávu at talgilda kommununa, at setanarbólkurin verður mannaður samsvarandi ískoytinum omanfyri og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Heðin Mortensen tekur ikki undir við uppskotinum.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 0 ímóti og 6 atkvøddu blankt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu:

Atkvøddi blankt: Høgni Joensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus,Odd Færø, Djóni Nolsøe Joensen og Annfinn Brekkstein.

## 25/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 124/17 | 17/00303-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 151/17 | 17/00303-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 146/17 | 17/00303-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 187/17 | 17/00303-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 182/17 | 17/00303-1 |
| 12 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 200/17 | 17/00303-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 212/17 | 17/00303-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 228/17 | 17/00303-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 249/17 | 17/00303-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 287/17 | 17/00303-1 |
| 17 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 287/17 | 17/00303-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 311/17 | 17/00303-1 |
| 19 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 315/17 | 17/00303-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 24/18 | 17/00303-1 |
| 21 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 25/18 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Tikið av skrá.
Ískoyti: Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Roknskapurin fyri juli framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai, juni og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Tróndur Sigurðsson | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| Odd Færø | Djóni Nolsøe Joensen | Høgni Joensen |
| | Jógvan Arge | |